BP - eitt av heimsins størstu oljufeløgum við í Lopra:

-Hetta er eina sera áhugaverd ætlan

At oljufeløg sum Shell og BP eru sinnað til at vera við í eini nýggjari Lopransboring vísir, hvussu høgt oljuídnaðurin prioriterar føroysku undirgrundina. Shell er heimsins størsta fyritøka, BP er millum heimsins størstu fyritøkur

At føroyska undirgrundin stendur høgt í metum í oljuheiminum fingu vit at vita nú um dagarnar, tá treistin fyri at vera við í eini nýggjari Lopransboring var úti. Ikki færri enn 18 altjóða oljufeløg høvdu tá boðað frá luttøku í hesi verkætlan.

Hóast samarbeiðsavtalan ikki er undirskrivað enn, so hevur Sosialurin skilt á fleiri av feløgunum, sum vilja vera við, at tey seta stórar vónir til boringina, sum byrjar í mai næsta ár.

Tað hevur ikki eydnast okkum enn at fáa eitt fullfíggjað yvirlit yvir feløgini, men vit kunnu tó upplýsa, at talan er um fleiri av teimum heilt stóru. Eitt nú Shell, Mobil, Statoil, Amerada Hess og BP.

Leiðarin á tíðindadeildini hjá BP í Aberdeen sigur við Sosialin, at BP metir Lopraverkætlanina sum framúr áhugaverda og av stórum týdningi fyri víðari kanningarnar av føroysku undirgrundini.

-Vit eru óvurlegnir um hesa ætlan leggur hann aftrat.

BP flaggskipið vestan fyri Hetland

At júst BP leggur so stóran

Umboð fyri 22 oljufeløg vórðu kunnað um Lopransætlanina í Havn herfyri. Her eru umboð fyri bretska felagið Brittish Gas. Mynd jan

dent á ætlanina sigur heldur ikki so lítið. Tí tað er júst BP, sum er flaggskipið tá tað snýr seg um nýggju oljuleiðirnar vestan fyri Hetland.

BP hevur staðið fyri nógvum boringum í hesum øki og verður so eisini fyrsta oljufelagið, sum fer undir framleiðslu av olju í økinum nakrantíð.

Miðvísu kanningarnar og góðu úrslitini hjá BP í økinum heilt út móti sjálvari Hetlandsrennuni tvs. skamt frá føroyska fiskimarkinum hevur so eisini gjørt, at felagið hevur stórar vónir til olju og gass í føroyskum øki. Tær mongu vitjanir av jarðfrøðingum og øðrum fólki frá BP í Føroyum er so eisini eitt prógv um, at felagið, sum í dag er um at vera størsta fyritøkan í Bretlandi, fegið vil gera íløgur í eina komandi føroyska olju- og gassvinnu.

-Forkanningarnar, sum gjørdar eru á føroyska økinum, siggja áhugaverdar út, men ikki fyrr enn vit hava borað niður gjøgnum basaltið ber til at siga nakað við vissu um, hvussu har sær út sigur talsmaðurin hjá BP í Aberdeen við blaðið.

jan

Væleydnað bogaskjóting í Danmark

Í sambandi við Danmarkarturin hjá Páll Hansen og Absalon Hansen úr Tambum og Schandorff Vang úr Oyri, skal verða sagt frá, at skjúttarnir eru væl nøgdir við túrin.

Í kappingini í Randers høvdu umleið 100 skjúttar boðað frá luttøku í olympiskari skjóting (recurve bogi) og compound. Skotið bleiv á 18 metra frástøðu í Randers høllini, sum er ein tann besta í Danmark til endamálið. Skjúttarnir vóru so nógvir, at olympisku skjúttarnir skutu seg liðnar fyrst, og síðan compound skjúttararnir.

Skjúttararnir – bæði menn og kvinnur – skutu í sokallaðum opnum bólkum, t.v.s. móti hvørjum øðrum. Bólkabýtið var Elitan, bólkur 1, 2 og 3. Absalon og Páll skutu í bólki 1. Teir høvdu báðir eina slaka byrjan, men komu væl við sum kappingin leið. Endaliga úrslitið: Páll bleiv nr. 5 við 539 stigum og Absalon nr. 7 við 524 stigum.

Í elitubólkinum hendi tað óhepna, at danska bogaskjótisambandið hevði boðað teimum bestu olympisku skjúttunum til venjingarlegu sama vikuskifti, og vóru teir tí ikki við. Vit fingu tí ikki høvi til at móta teimum. Leiðari til hesa venjingarlegu var svenski landsliðsvenjarin Leif Janson, sum hevur verið í Føroyum tvær ferðir og hjálpt okkum á leið.

Í compound skjótingini var bólkabýtið tað sama, sum nevnt frammanfyri, og var Schandorff í bólki 1. Tá hetta er ein tann størsta kappingin, luttikið hevur verið í, vóru nakrir nerar at stríðast við í byrjanini. Hetta hevur helst ávirkað skjótingina, men tá fyrsta umfar var av, hevði Schandorff skotið eitt gott úrslit og lá á øðrum plássi bert 2 stig aftan fyri fremsta mann. Næsta umfarið byrjaði heldur smáliga, men broyttist so við og við til tað betra. Næstseinasta pil í kappingini gjørdi Schandorff ein skjótitekniskan feil og pilurin fór uttan fyri stigateljing og endaði hann sostatt á 3. plássi við 548 stigum.

Um compound skjótingina annars kann sigast, at í elitubólkinum luttóku bæði silvur vinnarin frá innandura VM og verandi europameistarin. Úrslitini hjá teimum vóru eisini nakað, sum vit helst ganga og droyma um eina ferð at náa – ella kanska bert eitt petti á leið. Vinnarin setti nýtt danskt met og var ájavnur við europametið – 591 stig av 600 møguligum. Hetta má sigast at vera eitt bragd, tí miðjuringurin, sum telur 10 stig, er bert 2 cm í tvørmát, t.v.s. vinnarin rakti henda ring 51 ferðir meðan hinir 9 pilarnir bert vóru fáar millimetrar um at raka henda ring.

Annars kann sigast, at skjúttarnir fingu nakað av tilfari og hugskotum við heimaftur at arbeiða víðari við, og vónandi verður hetta við til at menna føroysku bogaskjótingina í framtíðini.

Ætlanin var eisini at luttaka í eini 25 metra kapping í Glostrup sunnudagin 3. des., men bleiv henda kapping tíverri avlýst vegna ov lítla undirtøku.

Skjúttarnir vilja takka Føroya Sparikassa, Farodane, Føroya Shell og Petersen og Guttesen fyri stuðulin, sum gjørdi ferðina til veruleika, stendur í skrivi frá 3 mannaliðnum.

Tíðindaskriv frá Svimjisambandi Føroya

Norðurlanda Junior Meistarakapping 1995

Til NJM '95, sum í ár verður í Vesterbro Svømmehal í Keypmannahavn dagarnar 9.–10. desember, hevur Svimjisamband Føroya úttikið hesar svimjarar:

Louis Poulsen og Rói á Kósini úr Svimjifelagnum Ægir, Kristian Martin Joensen úr Havnar Svimjifelag og Katrin Sørensen, Estrid Kristensen og Benthe Andersen úr Tvøroyrar Svimjifelag.

Teir 6 svimjararnir skulu vera við í 18 greinum í kappingini, sum er skipað við 10 greinum leygardag fyrrapart, 12 greinum leygardag seinnapart og 10 greinum sunnudag fyrrapart.

Allir teir føroysku svimjararnir eru inni í eini góðari menning. Svimjisambandið sendir javnan svimjarar til altjóða kappingar at møta ókendar í kapping. Seinast var til Cumbernault Open Meet, sum var í Skotlandi 10.–12. november. Hetta vísir seg at virka væl, tí okkara svimjarar vísa sum heild persónlig framstig undir og eftir slíkar kappingar.

Aldursmørkini, sum eru galdandi til NJM, eru: Drongir føddir í 1979 og 1980, gentur 1981 og 1982. Munurin á aldursmørkunum kemur av, at roknað verður við, at gentur tokka fyrr teirra besta.

Roknað verður við, at miðalgentan er best, tá ið hon er 18 ára gomul, og miðaldrongurin er bestur, tá ið hann er 22 ára gamal. Tíbetur eru undantøk frá hesum.

Ferðaleiðarar og venjarar á túrinum verða Jón Vestergaard og Rene Thomsen.

BINGO-áminning

Plátur og tøl skulu verða Sosialinum í hendi

fríggjadagin 8. des.

VIKING LOTTO

viku nr. 48, 29. nov. 95

Vinnaratøl: 3 - 8 - 17 - 28 - 32 - 38

Eykatøl: 15 - 18 - 25

Prognosa

6 vinnaratøl	1.124.292,- kr.
5 vinnaratøl + 1 eykatal	99.895,- kr.
5 vinnaratøl	5.691,- kr.
4 vinnaratøl	140,- kr.
3 v.tøl + minst 1 eykatal	49,- kr.

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

VIKING LOTTO

viku nr. 49, 6. des. 95

Vinnaratøl: 2 - 4 - 11 - 17 - 24 - 32

Eykatøl: 13 - 14 - 39

Prognosa

6 vinnaratøl	3.511.449,- kr.
5 vinnaratøl + 1 eykatal	63.368,- kr.
5 vinnaratøl	5.529,- kr.
4 vinnaratøl	139,- kr.
3 v.tøl + minst 1 eykatal	47,- kr.

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

Sethús til sølu

Sethús, matr. nr. 452, Tvøroyri verða við hesum lýst til sølu.

Grundøki: 401 m²
Húsavídd: 112 m² í trimum hæddum
Byggiár: uml. 1930

Áhugað kunnu venda sær til deild bankans á Tvøroyri, tlf. 71032.

FØROYA BANKI

Amnesty International

Upplýsingartíðirnar hjá Amnesty International, Føroya Deild eru: Týsdag, hósdag og fríggjadag frá kl. 13 til kl. 17. Tlf. 15816.